Uppskot til

Løgtingslóg
um
samstarv og samskipan av tænastum til børn og ung
(Barnalógin)

Kap 1.
Virkisøki og rættindi barnanna

§ 1. Henda lóg er galdandi fyri børn og ung í aldrinum 0-18 ár, sum hava bústað í Føroyum.
Stk. 2 Lógin fevnir eisini um foreldur og onnur í foreldranna stað, sum varða av børnum undir 18.

§ 2. Øll børn og foreldur, og onnur í foreldranna stað skulu hava atgongd til hjálp til samskipan av tænastum, sum verða veittar børnum og ungum í Føroyum
Stk. 2. Atgongd til samskipan sambært stk. 1 er treytað av skrivligari umbøn frá foreldrunum.

§ 3 Sum meginregla eigur barnið altíð at verða hoyrt, áðrenn avgerð um samskipan, viðvíkjandi viðurskiftum hjá barninum verður tikin sambært hesi lóg. Menning og búning barnsins skal tó loyva tí.
Stk. 2. Hevur barnið fylt 15 ár, er barnið at rokna sum partur í málinum, við teimum rættindum, sum har hoyra til.
Stk. 3. Hoyring sambært stk. 1 verður framd við beinleiðis samtalu við barnið.
Stk. 4. Í tann mun tað vegna aldur barnsins ella øðrum viðurskiftum ikki er møguligt at hava samtalu við barnið, skal áskoðan barnsins fáast til vegar á annan hátt.

Kap. 2
Skylda til samstarv

§ 4. Allir almennir myndugleikar, kommunalir sum landsmyndugleikar, ið hava viðkomandi heimildir í málum, sum snúgva seg um børn og familjur, hava skyldu at samstarva við trivnaðarráðgeva, netverkssamskipara og Barna- og Familjueindina samber §§ 2, 5,7 og 10.
Stk.2 . Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu samstarvið skal skipast.

Kap. 3
Stigvís hjálparskipan til børn og familjur

Trivnaðarráðgevarar

§ 5. Trivnaðarráðgevin skal tryggja, at barnið og / ella familjan fáa neyðuga kunning um tilboð og ráðgeving sum kunnu viðvirka til betri trivnað og menning hjá barninum.
Stk. 2. Trivnaðarráðgevin skal, har tað er neyðugt, inndraga aðrar myndugleikar og felagsskapir fyri at røkka málinum í stk. 1.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um skipan, virkisøkið, uppgávur, førleikar o.a.

§ 6 Um trivnaðarráðgevin metir, at tað er neyðugt, verður málið lagt til netverksamskiparan sambært § 7.

Netverkssamskiparar

§ 7 Netverksassamskiparin hevur ábyrgd av málum, sum eru meira samansett enn tey, trivnaðarráðgevin kann røkja einsamallur, men sum ikki eru av slíkum slagi, at tey krevja verksetan av fyriskipanum sambært barnaverndarlógini.

Stk. 2. Fyri at tryggja breitt fakligt samstarv millum myndugleikar og stovnar, skal netverksamskiparin savna viðkomandi fakbólkar, fyri at fáa til vegar eina heildarmeting av støðuni, og samskipa neyðug tiltøk til barnið ella tann unga.
Stk. 3. Netverkssamskiparin skal tryggja, at allir neyðugir aktørar verða tiknir við í arbeiðið, og at ein tvørfaklig handlingsætlan verður gjørd fyri barnið og ella tann unga.
Stk.4. Handlingsætlan sambært stk 3. skal sampakka við møguligum øðrum skrivligum ætlanum fyri barnið ella tann unga, sum eru gjørdar sambært aðrari lóggávu, fyri at tryggja eina samlaða og samanhangandi heildarætlan.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um skipan, uppgávur, útbúgving, virkisøkið og møguliga samsýning fyri netverkssamskipara.

§ 8. Um netverksamskiparin metir tað vera neyðugt, kann málið leggjast fyri Barna- og familjueindina sambært § 9.

Barna- og familjueind

§ 9 Sett verður á stovn ein Barna- og familjueind, sum veitir ráðgeving og stuðul til samskipan.

§ 10 Barna- og familjueindin kann taka einstøk mál upp í sambandi við viðgerðina av einum máli, um mett verður, at netverksamskiparin ikki hevur troytt allar viðkomandi møguleikar.
Stk. 2 Í teimum førum, ið eru fevnd av stk. 1, kann Barna- og familjueindin innkalla allar viðkomandi partar til samráð sum liður í at stuðla netverksamskiparanum í arbeiðinum við at fremja samskipan av tænastum til barnið. Netverksamskiparin varðveitir samskipandi ábyrgdina fyri málinum.
Stk. 3. Um eitt mál ikki verður loyst sambært stk. 1 ella stk. 2, kann Barna- og familjueindin velja at leggja málið fyri hægri avvarðandi myndugleika innan viðkomandi ábyrgdarøki.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um skipan av Barna- og familjueindini.

§ 11. Barna- og familjueindin skal savna inn viðkomandi hagtøl og gera árliga frágreiðing um arbeiðið, og veita landsstýrisfólkum tilmæli og ráðgeving.

§ 12 Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu ábyrgd av Barna- og familjueindini.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur fyri virkisøkið hjá Barna- og familjueindini, harundir skipan av hesari.

Kap 4
At lata persónsupplýsingar víðari

§ 13 Trivnaðarráðgevi, netverkssamskipari og Barna- og familjueindin skulu altíð tryggja, at allar neyðugar upplýsingar um støðu barnsins fylgja málinum, tá tað verður latið víðari millum stigini í skipanini av hesi lóg, ella til aðrar myndugleikar at viðgera.
Stk. 2. Upplýsingar skulu latast víðari í skrivligari og fullfiggjaðari skráseting, har tað skal framganga:

1. orsøk til tiltøk
2. gjøgnumførdar metingar og tiltøk,
3. fakligar niðurstøður
4. upplýsing um serligan tørv barnsins, og
5. avvarðandi myndugleikar og fakfólk, ið hava verið knýtt at málinum.

Kap 5
Gildiskoma

§ 14. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2028
Stk. 2. Tó kemur §§ 9 og 12 í gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Fleiri frágreiðingar og kanningar vísa á, at mistrivnaðurin millum børn og ung seinastu árini er nógv øktur, og at fleiri og fleiri børn, ung og familjur teirra av álvara stríðast. Talið av børnum og ungum, sum av ymsum orsakum verða víst til serskipanir, og næmingar, sum fáa heima- og sjúkraundirvísing, er alsamt vaksandi. Trýstið á skipanir er økt, og bíðilistar gerast bara longri, samstundis sum tað vanta útbúgvið starvsfólk og starvsfólk við servitan.

Barna- og ungdómsøkið í Føroyum er regulerað í nógvum lógum, og fleiri ráð og stovnar, eitt nú kommunur, umsita økið. Tænastur og fyriskipanir, sum skulu veitast børnum og ungum í Føroyum, eru tí staðsettar í fleiri ymiskum skipanum. Hóast nógv góð tilboð eru í Føroyum, so hava fleiri álit og frágreiðingar víst á vantandi tvørfakligt og tvørgeiraligt samstarv.

Samskipanin millum tilboðini er tískil ikki nóg góð, og tí gerst skipanin stirvin, og tað verður møtimikið og trupult at fáa røttu hjálpina. Tí eru eisini nógv dømi um børn og ung, sum ikki hava fingið røttu hjálpina, ella har hjálpin kemur ov seint til at gera mun. Fleiri dømi eru eisini um børn, ung og familjur teirra, sum detta niður millum skipanir.

Tørvur er tí á at fáa betri samskipan millum skipanirnar, soleiðis at fakliga og figgjarliga tilfeingið verður brúkt so skynsamt sum møguligt, samstundis sum størri trygd verður fyri, at tað einstaka barnið ella tann ungi, fær neyðugu tænastuna og fyriskipanina, tá tørvur er á tí.

Fyri at fáa eina góða mynd av, hvat børnini hugsað um eitt gott barnalív, hevur tað m.a. í tíðarskeiðinum januar – mai 2025 verið skipað fyri ymiskum tiltøkum, t.d. varð skipað fyri einari Barnaráðstevnu tann 21.-23. januar 2025, har børnini í Føroyum fingu høvi at greiða frá, hvat teirra ynskir eru, tá talan er um eitt gott barnalív í Føroyum. Meira enn 90% av næmingaráðunum, líka úr grunddeild til miðnám vóru umboðað.
Umframt skúlabørn, var eisini skipað fyri verkstovum og fokusbólkum, har dentur varð lagdur á at tryggja røddina hjá børnum í fátækaváða, børnum sum bera brek, ella sum hava serligan tørv umframt umsorganaryvirtikin børn.

Umframt at fáa barnanna rødd fram gjøgnum tiltøk og ráðstevnu, var í sambandi við sjálvt lógararbeiðið skipað fyri eini serligari barnahoyring í Norðurlandahúsinum heystið 2025. Hetta arbeiði varð gjørt í tættum samstarvi við Undirvísingarstýrið og aðrar samstarvspartar.

Endamálið við hesari barnahoyring var at loyva børnum og ungum at fáa møguleika fyri virkið at luttaka og viðgera teir táttir, sum skulu vera við í eini barnalóg.

Umframt hetta, so varð eisini skipað soleiðis fyri, at børnini sluppu at gera sítt egna hoyringarsvar umvegis m.a. næmingaráðini, soleiðis at tey eisini kundu vera umboðað í sjálvari lógartilgongdini.

Harnæst gav barnahoyringin eisini børnunum innlit í ta demokratisku tilgongdina, sum liggur handan lógarsmíð og lógararbeiðið, og vóru tey í hesum sambandi m.a. kunnað um, hvat ein hoyring er, hví man hoyrir, og hvussu ein hoyring kann ávirka og viðvirka til eina lóggávu.
Umframt at geva næmingum kunning, varð eisini skipað fyri einari online verkstovu fyri starvsfólkini, sum vóru um børnini, og sum arbeiða við næmingaráðnum, har hesi vóru kunnað um tilgongdina og lærugongd, og fingu innlit í viðkomandi tilfar.

Talan var tí um eina breiða ráðstevnu við sera stórari undirtøku, sum gav bæði børnum, ungum og starvsfólkum innlit í fyriliggjandi lóggávu, umframt innlit í, hvussu tann demokratiska tilgongdin verður tryggjað, tá farið verður undir at gera lógir.

Tann 20 november 2025, á altjóða barnarættindadegnum, vóru hoyringarsvarini handað eigarunum, sum varða av Barnaverkætlanini, har eisini næmingaráðini luttóku. Hoyringarsvarini eru viðfest í fylgiskjali 2.

1.2. Galdandi lóggáva

Eitt umfatandi vitanargrundarlag, sum byggir á greiningar av verandi frágreiðingum (sum t.d. heildarætlanum, tilmælum og álitum), tvær nýggjar lógar- og samstarvsgreiningar, niðurstøður frá fimm tvørgeiraligum royndarverkætlanum og beinleiðis vitan frá umleið 670 børnum og ungum í aldrinum 3-20 ár, umframt 350 fakfólkum, gevur eina samljóðandi mynd: Tørvur er á at nýskipa barna- og ungdómsøkið í Føroyum. Bæði tá talan er um at skapa karmar fyri menning, trivnaði og heilsu (fremjandi), tá talan er um at fyribyrgja, at mistrivnaður økist, menningin gongur galið, ella heilsan versnar, og tá talan er um tænastur, sum skulu veita viðgerð og stuðul. Hóast nógv eldhugað fakfólk, góðar tænastur og fyriskipanir, er tørvur á grundleggjandi skipanarligum og bygnaðarligum avbjóðingum, bæði nú og tey nógvu komandi árini.

Hóast verandi lóggáva innan barna- og ungdómsøkið í stóran mun tykist at vera í lagi, megna vit sum samfelag ikki altíð at veita nøktandi karmar fyri øll børn, ung og familjur teirra.

Støðan í dag er í nógvum førum tann, at tiltøk ikki verða sett í verk, tá tørvur er har, t.d. tá man varnast mistrivnað e.a., men at man í fleiri førum bíðar eftir útgreining áðrenn hjálp verður veitt.

Høvuðstrupulleikar kunnu lýsast við niðanfyri standandi viðurskiftum:

1) Ógreitt ábyrgdarbýti, vantandi samstarv tvørtur um geirar og vantandi rættstundis tiltøk

Barna og ungdómsøkið er regulerað í ymiskum lóggávum, og ábyrgdin av tænastum og tilboðum til børn og ung er býtt millum land og kommunur. Hetta kann skapa ógreiðu.

Silohugsan og væntandi samskipan gera, at trupult er at fáa samlað yvirlit yvir økið. Hetta kann hava við sær, at trupult er at lofta tvørgangandi avbjóðingum nóg væl, og tí gerst váðin fyri dupultfunktiónum, og / ella manglandi tilboðum størri.

Úrslitið er ógreiða og fjølbýtt ábyrgd – har eingin veruliga stendur til svars, tá børn, ung og familjur teirra detta niður ímillum skipanir, ella eiga ábyrgdina av at lofta teimum aftur. Ein greið og burðardygg skipan manglar, sum kann tryggja rættstundis og samanhangandi tilboð og tænastur við nøktandi manning, førleikum og fígging.

Hesir trupulleikar kunnu eisini ávirkast av m.a. serføroyskum viðurskiftum – so sum landafrøðiligari spjaðing, avmarkaðum fólkatali, og broytingum í íbúgvarasamansetingini, sum kunnu hava við sær avbjóðingar við at fáa eitt dygdargott fakligt umhvørvi, og at tryggja eitt javnbjóðis tilboð um alt landið.

Tørvur er tí á føstum leisti fyri bindandi samstarvi – ein tørvur, sum gongur aftur í øllum kanningum og tilmælum á økinum.

2) Ójøvn atgongd til tænastur og tilboð
Atgongdin til hóskandi hjálp er í ávísan mun avmarkað – bæði tá tað snýr seg um lággáttartilboð og serkøna viðgerð.

Neyðugt er tí at tryggja javnbjóðis atkomu, og at útgangsstøðið verður tikið í tørvinum hjá tí einstaka barninum ella tí unga. Hetta má tó skiljast í einum breiðum týdningi, har atlit eisini verður tikið at nærumhvørvinum hjá barninum ella tí unga, umframt teimum skipanum, sum kunnu ávirka lívsgóðsku, heilsu og menningarmøguleikar hjá barninum.

Tørvur er tí yvirskipað á at lyfta dygdina á tænastum og tilboðum til øll børn og ung. Hetta krevur betur samskipan, nøktandi fígging og fleiri útbúgvin fakfólk.

3) Manglandi trygging av rættindum og luttøku hjá børnum
Hóast Føroyar hava tikið undir við ST-barnarættindasáttmálanum, eru barnarættindini ikki altíð nóg væl tryggjað í føroyskari lóggávu og fyrisiting.

Rætturin at verða hoyrdur verður ikki á øllum økjum nøktandi framdur í verki, og kann hetta viðføra, at børn og ung ikki í nóg stóran mun sleppa at vera við til at ávirka avgerðir í málum, sum viðkoma teimum.

Hetta er óheppið, tí ávirkanin frá barninum ella tí unga, kann geva myndugleikum betri innlit og harvið styrkja dygdina í teimum avgerðum, sum verða tiknar.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Tørvur er á eini tvørgangandi barnalóg, sum skal tryggja dygd í tænastum og tilboðum, og javnbjóðis atgongd til rættstundis og skikkaða tænastu fyri øll børn og ung.

Barnalógin skal virka sum ein yvirskipaður karmur, sum setir greiða kós og skapar bindandi karmar fyri øll børn og ung og allar aktørar á barna- og ungdómsøkinum í Føroyum

Ein høvuðspartur í umskipanini er ein styrkt netverksskipan millum stovnar og geirar, sum tekur støði í føroyskum og útlendskum menningarverkætlanum og nýskipanum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Barnalógin skal tískil í høvuðsheitum styrkja niðanfyri standandi økir:

Rættindi hjá børnum at verða hoyrd
Barnalógin tryggjar, at barnið altíð verður hoyrt, tá samskipan verður gjørd sambært hesi lóg, og at sjónarmiðini hjá barninum skulu takast við í avgerðum. Hetta sampakkar væl við:

- **Foreldramyndugleikalógina**, har barnsins besta og barnsins egnu sjónarmið altíð skulu takast við.
- **Barnaverndarlógina**, har myndugleikar skulu leggja dent á loysnir, sum eru best fyri barnið.

Tvørfakligt samstarv
Barnalógin ásetur skyldu til samstarv millum allar almennar myndugleikar, bæði kommunalar og landsmyndugleikar. Hetta er í samsvari við:

- **Barnaverndarlógina**, sum longu áleggur tvørfakligt samstarv millum barnavernd, heilsuverk, skúlar o.o..
- **Almannalógina**, sum krevur tvørfakliga meting og samskipaðar ætlanir, har persónur hevur samansettan tørv.
- **Sjúkrahúslógina** og **Psykiatrilógina**, sum leggja dent á samráð og samtykki, men eisini á samstarv millum stovnar.

Stigvís skipan
Uppskotið leggur dent á stigvísa hjálparskipan:

- Trivnaðarráðgevi sum fyrsta stig.
- Netverksamskipari við fakligari heildarmeting sum næsta stig.
- Barna- og familjueindin sum er ein eind, sum veitir ráðgeving og virkar stuðlandi, tá mál vera løgd fyri eindina av netverksamskiparanum, sjá § 11 og serligu viðmerkingarnar til hesa, og sum eisini skal virka fyri, at skipanir, sum veita tænastur til børn, kunnu virka enn meira samskapandi.

  Hetta samsvarar við og styrkir:
- **Dagstovnalógina**, har børn við serligum tørvi hava rætt til pláss og stuðul.
- **Fólkaskúlalógina**, sum tryggjar sernámsfrøðiligan stuðul og tvørfakligt samstarv.
- **Integratiónslógina**, har kommunur og integratiónsmyndugleikin skulu arbeiða saman, serliga um børn.

Tryggja, at neyðugar upplýsingar fylgja barninum / málinum
Barnalógin ásetur, at neyðugar upplýsingar skulu fylgja barninum millum stigini í hjálparskipanini, men altíð sambært reglum um dátuvernd. Hetta sampakkar við:

- **Dátuverndarlógina**, sum hevur ásetingar viðvíkjandi minst neyðugu upplýsingar, rætt til innlit og trygd í viðgerð.
- **Barnaverndarlógina**, sum gevur myndugleikum víðgongda heimild at skifta upplýsingar, tá tað er fyri barnsins besta.

Heilsu- og fyribyrgingarøkið
Barnalógin stuðlar undir fyribyrgjandi og heilsufremjandi arbeiði hjá trivnaðarráðgeva og netverksamskipara. Hetta sampakkar við:

- **Kunngerð um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**, har kommunulæknar og heilsufrøðingar hava skyldur at eygleiða og ráðgeva.
- **Sjúkrahúslógina**, sum tryggjar børnum ókeypis viðgerð.
- **Psykiatrilógina**, sum m.a. hevur ásetingar um, hvussu børn undir 15 ár kunnu fáa viðgerð við samtykki frá foreldramyndugleikanum.

Nýggja Barnalógin stuðlar uppundir verandi regluverk innan barna- og ungdómsøkið, og viðvirkar til, at verandi lógir, harundir lóg um barnavernd, skúla, dagstovnaøki, heilsuverk, almannaverk og integratiónsumráð koma í eina felags tvørfakliga skipan.

Eitt av týdningarmestu nýbrotunum í lógini er skipanin við Barna- og familjueindini sum ein samskipandi og stuðlandi funktión, ið skal styrkja samanhangin og samstarvið millum geirar. Eindin hevur til endamáls at stuðla undir, at upplýsingar innan fyri galdandi reglur um dátuvernd kunnu fylgja barninum, soleiðis at hjálp og átøk verða betur samskipað.

Barna- og familjueindin arbeiðir ikki við einstøkum málum og yvirtekur ikki ábyrgd frá øðrum myndugleikum, men virkar sum ein felags samskipanareind í teimum førum, har børn hava serligan tørv, og har tørvur er á, at fleiri myndugleikar og stovnar arbeiða saman á ein samanhangandi hátt. Eindin veitir ráð og stuðul til myndugleikarnir, fyri at teir einsæris og í felag støðugt menna smidligar skipanir, sum kunnu veita so góðar tænastur til børn og ung sum møguligt.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið í hoyring hjá.....

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligu avleiðingarnar av Barnalógini eru tongdar at, hvussu skipanin verður verksett í praksis. Endamálið við lógini er ikki at byggja eina nýggja, kostnaðarmikla skipan omaná tær skipanir, sum longu eru til staðar, men at betra um samskipan og arbeiðshættir, umframt at nýta fakliga og fíggjarliga tilfeingið, sum longu er á barna- og ungdómsøkinum.

Lógin leggur tí upp til eina stigvísa og tillagaða verkseting, har royndir og tørvur í praksis skulu vera avgerandi fyri víðari menning og fígging.

Mett verður, at ein týðandi partur av teimum avbjóðingum, sum Barnalógin skal loysa, ikki stava frá vantandi tænastum, men frá manglandi samanhangi og dupultarbeiði tvørtur um geirar. Betri samskipan og greiðari ábyrgdarbýti kunnu tí, umframt at gagna børnum og familjum, eisini viðvirka til eina meira skilagóða nýtslu av verandi tilfeingi.

Fíggjarligu avleiðingarnar skulu tí síggjast í einum longri perspektivi, har fyribyrgjandi arbeiði og rættstundis íblanding kunnu minka um tørvin á tyngri og kostnaðarmiklari átøkum seinni.

Trivnaðarráðgevin er ætlaður sum fyrsta og lægsta stigið í skipanini og hevur ein fyribyrgjandi og vegleiðandi leiklut. Børn ella foreldur kunnu venda sær trivnaðarráðgevan, um mistrivnaður og trupulleikar eru, áðrenn hetta gerst til eitt størri mál. Tað snýr seg um at fyribyrgja tíðliga. Fíggjarliga verður lagt upp til, at funktiónin í stóran mun verður skipað við umlegging og tilrættingum av verandi arbeiðstíð og uppgávum. Í nógvum førum finnast longu funktiónir og arbeiðshættir innan skúla og dagstovnaøkið, sum kunnu sameinast við hesa funktiónina. Her verður hugsað um AKT, SSP-arbeiði og heilsufremjandi arbeiði, sum arbeiða við trivnaði og fyribyrging. Barnalógin leggur upp til, at hesar verða knýttar betur saman og givnar ein greiðari karm, heldur enn at seta eitt stórt tal av nýggjum størvum. Tað er tískil ikki ein treyt, at hvør stovnur ella kommuna seta trivnaðarráðgeva í fulltíðarstarv. Funktiónin kann skipast smidliga og lokalt við parttíðarfunktiónum, felags loysnum ella býttum arbeiðstíðum, alt eftir støddd, tørvi og verandi skipanum.

Útreiðslurnar liggja framvegis hjá tí myndugleika, sum hevur rakstrarábyrgdina av stovninum, men í eini innleiðandi royndartíð verður mett, at hetta í stóran mun kann loysast innan verandi fíggjarligar karmar.

Tá mál eru meira samansett og fevna um fleiri geirar, verður netverkssamskiparin tikin við. Fíggjarliga hevur skipanin við netverkssamskiparum avleiðingar, serliga fyri kommunur.

Lógin leggur tó upp til, at netverkssamskiparar kunnu skipast á ein hátt, sum byggir á verandi bygnaðir, herundir bygnaðin á barnaverndartænastunum. Hetta gevur møguleika fyri at nýta royndir, fakligar felagsskapir og verandi umsitingarligar karmar, og kann samstundis minka um tørvin á nýggjum og dupultum skipanum. Ætlanin er tó ikki, at netverkssamskiparar beinleiðis verða settir sum partar av barnaverndartænastunum, men kunnu skipast landafrøðiliga í somu økjum, sum kommunurnar kenna frammanundan. Nýggja skipanin skal virka fyribyrgjandi, soleiðis at tað ætlandi vera færri barnaverndarmál í framtíðini.

Kommunur skulu hava møguleika at samstarva um netverkssamskiparar, og talið á samskiparum eigur at verða ásett stigvíst, út frá royndum og veruligum tørvi, heldur enn einum fastsettum tali í lógini.

Fíggjarliga verður mett skilagott, at landið tekur ein virknan lut í fíggingini, soleiðis at kommunurnar ikki einsamallar bera byrðuna av eini skipan, sum hevur eitt breitt samfelagsligt endamál.

Barna- og familjueindin kundi verið skipað sum ein hybrid samskipanareind við felags eigaraskapi millum land og kommunur. Fíggjarliga verður lagt upp til, at eindin verður hildin lítil og virkar innan hóvligar karmar. Hybrid-modellið hevur tann fyrimun, at ábyrgd og fíggjarligur váði verða býtt millum partarnar, og at skipanin ikki verður ein sjálvstøðugur og kostnaðarmikil yvirstovnur. Útreiðslurnar skulu í stóran mun byggja á umlegging og samskipan av verandi menningar- og samskipanarfunktiónum.

Fyri at tryggja fíggjarligt haldføri verður lagt upp til, at verksetingin verður fylgd tætt, og at fíggjarligu avleiðingarnar verða eftirmettar regluliga. Møguligar víðkanir ella varandi økingar í útreiðslum skulu viðgerast í vanligari fíggjarlógartilgongd og í samráð við kommunur og viðkomandi geirar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Barnalógin hevur umsitingarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur, men endamálið við lógini er ikki at skapa eitt nýtt, tungt umsitingarligt lið. Tvørturímóti er endamálið at gera arbeiðið greiðari, meira samanhangandi og minni fløkt, soleiðis at børn og familjur ikki detta niður ímillum skipanir.

Umsitingarliga byggir skipanin á ein stigvísan leist. Trivnaðarráðgevin er ætlaður sum ein nærverandi og lætt atkomulig funktión, ið skal virka fyribyrgjandi og vegleiðandi. Trivnaðarráðgevin er ikki saksviðgerandi myndugleiki og tekur ikki avgerðir, sum liggja hjá øðrum myndugleikum. Umsitingarliga merkir hetta, at funktiónin kann integrerast í verandi arbeiðshættir og skipanir, heldur enn at krevja nýggja og sjálvstøðuga umsiting.

Netverkssamskiparin hevur ein samlandi umsitingarligan leiklut í teimum málum, har tørvur er á samskipan tvørtur um fleiri geirar. Umsitingarliga verður lagt upp til, at netverkssamskiparar kunnu fylgja verandi bygnaði á barnaverndartænastunum. Hetta gevur møguleika fyri at nýta kendar skipanir, arbeiðshættir og faklig netverk, og tryggjar samstundis eina greiða og kendan organisatoriska forankring. Netverkssamskiparin arbeiðir í

tøttum samstarvi við trivnaðarráðgevan og viðkomandi geirar, men yvirtekur ikki ábyrgd, sum liggur hjá øðrum myndugleikum.

Barna- og familjueindin kundi verið skipað sum ein hybrid samskipanareind við felags eigaraskapi og møguliga kann verða staðsett hjá Kommunufelagnum. Við at staðseta eindina saman við SSP-samskipanini og Barnaverndarstovu Føroya verður bygt víðari á eitt verandi tvørkommunalt og tvørgeiraligt samstarv, sum longu hevur royndir við samskipan, ráðgeving og menning á barna- og ungdómsøkinum. Hetta gevur eindini eina náttúrliga og trúverdiga forankring, samstundis sum hon ikki verður løgd undir eitt einstakt aðalráð.

Umsitingarliga hevur Barna- og familjueindin ikki ábyrgd av einstøkum málum og tekur ikki avgerðir fyri aðrar myndugleikar. Leiklutur hennara er at virka stuðlandi fyri netverkssamskiparar, at samskipa arbeiðshættir og mannagongdir á skipanarligum stigi, at eyðmerkja fløskuhálsar og at savna og miðla vitan tvørtur um geirar. Eindin kann leggja fram fakliga grundað tilmæli til politiska og fyrisitingarliga leiðslu, men hon er ikki eftirlits- ella kærumyndugleiki.

Við hesum bygnaði verður umsitingarliga ábyrgdin greitt býtt. Einstøku myndugleikarnir varðveita framvegis sína lógarfestu ábyrgd, meðan samskipanin verður styrkt gjøgnum netverk og felags arbeiðshættir.

Hybrid-modellið og møguliga staðsetingin hjá Kommunufelagnum tryggja, at arbeiðið verður forankrað hjá bæði kommunum og avvarandi ráðum hjá landinum, og at allar partar hava eina felags kenslu av eigaraskapi.

Tá ið skipanin verður implementerað koma allir luttakandi myndugleikar at verða við í tilgongdini, soleiðis at tað verða samskipaðar mannagongdir sum skipanin kemur at virka eftir.

Barna- og familjueindin kemur at hava sum uppgávu at standa fyri at førleikamenna allar partar í skipanini, soleiðis at tað riggar at arbeiða í netverkum og at trivnaðarráðgevar og netverksamskiparar fara at hava felags arbeiðshættir.

Ein grundleggjandi treyt fyri umsitingarligt haldføri er, at skipanin verður eftirmett og tillagað so hvørt tørvur er á tí. Umsitingarligu avleiðingarnar skulu tí regluliga verða mettar í samráð við kommunur og geirar, soleiðis at arbeiðshættir kunnu einfaldast og tillagast eftir royndum. Eisini verður roknað við, at bygnaðarliga broytingar verða gjørdar, fyri at gera skipanirnar einfaldari.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið..

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landium.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur avleiðingar fyri øll børn og ung í Føroyum við tað at tað tryggjar teimum betri samanhangandi tænastur tvørturum geirar. Uppskotið skal stuðla upp undir eina skjótari hjálp til barnið / tann unga, og soleiðis viðvirka til, at avbjóðingarnar sum eru, verður møttir, áðrenn tað veksur seg størri og truplari.

Uppskotið hevur avleiðingar fyri teir stovnar sum hava lóggávu sum viðvíkja børnum og ungum, á tann hátt, at hesi hava skyldu at samstarva.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við ST- barnarættindasáttmálan (UN Convention of the Rights of the Child) sbr. bekendtgørelse nr 6 af 16 januar 1992 om FN-konvention af 20. November 1989 om barnets rettigheder.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya, hinumegin), *Evropeiski mannarættindasáttmálan*, sambært Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention., og *Sáttmála Sameindu Tjóða* uum rættindi hjá einstaklingum sum bera brek, sbr. Bekendtgørelse nr. 20 af 15 november 2017 af FN-konvention af 13. Desember 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki áseitngar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið áleggur øllum kommunum at hava ein netverkssamkipara. Kommunurnar kunnu tó samstarva um felags samskipara.

Lógaruppskotið áleggur bæði land og kommunu skyldu at tryggja børnum og ungum upp til 18 ár atgongd til ein trivnaðarráðgeva. Skyldan hjá landinum er tá talan er um børn á økinum sum landi varðar av, sum t.d. fólkaskúlin, og kommunur tá talan er um børn innan virkisøkið kommununnar, t.d. dagstovnaøkið.

Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at áseta nærri regla um virki hjá ávikavist trivnaðaráðgevara, netverkssamskipa og Barna- og familjueindina..

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gegvur ikki almennum myndugleika atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevnda omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	ja	ja	Nei	nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	ja	ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

§ 1

Stk.1
Ásetingin staðfestir, at lógin er galdandi fyri øll børn og ung til og við 18 ár, sum hava bústað í Føroyum. Hetta merkir, at tað er bústaðurin, ikki ríkisborgarastøðan, ið er avgerandi fyri, um lógin fevnir barnið. Ásetingin tryggjar, at øll børn, sum vaksa upp í Føroyum, hava somu rættindi og vernd sambært lógini, uttan mun til tjóðskap, uppruna ella annað.
Tey sum fáa eina samskipaða tænastu sambært lógini tá tey fylla 18 ár, eiga framhaldandi at fáa hesa tænastu inntil onnur skipan hevur tikið yvir, inntil tey eru fylt 23 ár.
Hetta er í tráð við *Barnarættindasáttmálan hjá ST*, sum leggur vekt á, at øll børn skulu hava somu rættindi uttan mismun.

Stk.2
Her verður ásett, at lógin eisini fevnir um foreldur og onnur í foreldranna stað, sum virka vegna børn undir 18 ár. Hetta er neyðugt, tí avgerðir og ábyrgd í mun til barnsins rættindi og trivnað liggur hjá hjá teimum, sum hava foreldramyndugleikan ella eru sett sum verjar.
Ásetingin fevnir eisini um komandi foreldur, bæði mammu og pápa, soleiðis at hesa eisini hava rætt til hjálp ella stuðul sbr. hesi lóg. Hetta kann t.d. vera tá mamma / pápi bera brek ella hava sjúku, og har tað er neyðugt við átøkum, fyri at stuðla undir einum tryggum umhvørvi fyri barnið

§ 2

Stk. 1
Við § 2 verður ásett, at børn og foreldur, og onnur í foreldranna stað, hava atgongd til trivnaðarráðgeva sambært § 5 og til netverkssamskipara sambært § 7.

Endamálið við hesar áseting er at tryggja, at børn og foreldur, ið hava tørv á stuðli, kunnu fáa vegleiðing og hjálp til samskipan av teimum tænastum, ið verða veittar barninum.

Stk. 1 fevnir um samskipan av tænastum, sum verða veittar til børn, og hevur til endamáls at styrkja samskipan millum viðkomandi myndugleikar og fakligar eindir í Føroyum, og skal ásetingin sostatt stuðla undir eina enn meira samanhangandi tilgongd í arbeiðinum við børnum og familjum.

Rætturin til atgongd sambært hesari áseting er ein rættur til vegleiðing og samskipan, men gevur ikki í sær ein sjálvstøðugan rætt til ávísar tænastur ella tiltøk.

Stk. 2 ásetir, at atgongd til samskipan sambært stk. 1 er treytað av skrivligari umbøn frá foreldrunum, sjá fylgiskjal 2.

Kravið um skrivligu umbøn tryggjar, at samskipanin bert verður sett í verk við samtykki frá foreldrunum og virkar sum ein fyrisitingarlig treyt fyri, at samskipanin kann setast í verk. Samskipan sambært fyriliggjandi lóg er byrjar tí einans, um so er, at talan er um ynskir um hetta frá foreldrunum.

Vísandi til at talan er um samstarv millum bæði myndugleikar, stovnar ***og*** foreldur v.m., er neyðugt at foreldur, og ikki einans foreldramyndugleikaindehavari, ynskir samskipan sambært hesi lóg.

Foreldur kunnu til eina og hvørja tíð velja, at taka sína umbøn um samskipan sambært hesari lóg aftur.

Ein umbøn um samskipan, ella umbøn um at steðga samskipan sambært hesari lóg, verður veittur trivnaðarráðgevaranum ella netverksamskiparanum, sum skrásetur hetta í skipan, sum Barna- og familjueindin skipar fyri.

Tey sum eru um børn í dagligdegnum, harundir starvsfólk á stovni o.o., kunnu eisini heinta sær ráðgeving ísv trivnað í einum skúlaflokki ella barnaflokki e.a..

Trivnaðarráðgevin kann eisini sjálvur venda sær til foreldur við ráðgeving um møgulig tilboð o.a. sum kann vera til gagns fyri barnið, harundir bjóða fram samskipan.

Landsstýrisfólkinum verður sbr. § 5 stk. 3 og § 7 stk. 5 givið heimild til at áseta nærri reglur um virkisøkið o.a. hjá trivnaðarráðgevaranum og samskiparanum.

§ 3

Stk.1 og stk 2

Greinin slær fast, at barnið skal hoyrast, áðrenn avgerð viðvíkjandi samskipan eftir hesi lóg verður tikin. Hetta sampakkar við Barnaverndarlógina § 9 og § 15. stk. 2, umframt foreldramyndugleikalógina § 2 stk. 3, har tað er ásett at barnsins sjónarmið skal takast við í øllum málum, alt eftir aldur og búning.

Umráðandi er, at barnið verður hoyrt leypandi í tilgongdini av samskipan av tænastum, soleiðis at eisini barnið verður tikið við í nøktandi mun.

Við tað at barnalógin er ein lóg sum tekur støði í samskipan og samstarv, har foreldur er ein týðandi partur, verður ikki mett, at samtala við barnið tænir lógarinnar endamálið, um so er, at foreldrini ikki vilja samstarva og geva samtykki til, at samtala verður við barnið. Í teim førum har foreldur ikki ynskja at samstarva og stuðla upp undir við at fáa barnsins sjónarmið fram sambært hesi lóg, skal málið tískil verða lagt til avvarðandi barnavernd.

Stk. 3 og 4

Ásett er, at hoyringin verður framd við beinleiðis samtalu við barnið. Hetta er týdningarmikið, tí tað gevur barninum ein tryggan møguleika at siga sína áskoðan uttan, at onnur tulka fyri tað.

Í summum førum ber ikki til at hava beinleiðis samtalu við barnið, til dømis orsakað av lágum aldri, sálarligum avbjóðingum ella øðrum viðurskiftum. Í slíkum førum áleggur ásetingin myndugleikanum skyldu at finna onnur hóskandi amboð til at fáa sjónarmið barnsins til vega – eitt nú gjøgnum eygleiðingar ella á annan hátt. Hetta tryggjar, at øll børn, eisini tey minstu og / ella veikastu, fáa møguleika at verða tikin við.

Stk. 4 og 5 stuðlar uppundir grein 12 í Barnarættindasáttmálanum hjá ST, har ásett er, at barnið skal hava rætt til at geva sína meining til kennar.

§ 4

Stk.1

Greinin áleggur øllum almennum myndugleikum – bæði kommunalum og landsmyndugleikum – skyldu at samstarva við trivnaðarráðgeva, netverkssamskipara og Barna- og Familjueindina. Hetta er eitt av høvuðseyðkenninum í nýskipanini, sum skal tryggja, at børn og familjur ikki detta niður ímillum skipanir og fáa samskipaðar tænastur, tá tørvur er á tí. Í verandi lóggávu eru fleiri sektorskipanir, har ábyrgd er býtt sundur: barnaverndarlógin, dagstovnalógin, fólkaskúlaskipan, almannaverk, sjúkrahúsverk o.s.fr. Henda skipanin samlar og bindur hesi saman við eini lógbundnari skyldu til samstarv.

Skyldan inniber m.a. at møta til fundir sum skulu tryggja, at allir viðkomandi partar luttaka í fakligum samskifti. Hetta minnir um reglurnar í *Barnaverndarlógini* um tvørfakligt samstarv, men fer eitt stig víðari við at gera tað til eina felags skyldu fyri allar almennar stovnar – ikki bara barnaverndarøkið.

Um so er at allir partar ikki vilja luttaka, kann málið leggjast fyri Barna- og Familjueindina. Um partarnir framvegis ikki vilja luttaka ber til hjá Barna- og Familjueindini, at venda sær til avvarðandi landsstýrisfólk, ið varðar av tí parti sum ikki vil viðvirka, við boðum um hetta, sjá § 10 stk. 3 og serligu viðmerkingar til hesa.

Innkalling til fundir viðvíkjandi samskipan av tænastum skal einans verða send teim pørtum, sum eru viðkomandi fyri ta samskipan sum skal planleggjast, soleiðis at tað ikki gerst óneyðugt fundarvirksemi fyri partarnar.

Í samband samstarv sambært hesi áseting kunnu upplýsingar flytast millum myndugleikar, tó bert eftir prinsippinum um neyðugleika og í tráð við reglur um vernd av persónupplýsingum. Hetta tryggjar, at barnið fær neyðugan stuðul, men at rættindi til privatlív verða varðveitt.

Stk. 2.

Ásetingin gevur landsstýrisfólkunum heimild at áseta nærri reglur í kunngerð. Hetta gevur møguleika at tillaga samstarvsformar og mannagongdir eftir royndum í praksis. Við hesi heimild kann tryggjast, at samstarvið verður skipað eins í øllum kommunum og stovnum, og at samsvar er við aðra lóggávu, eitt nú barnaverndarlógini og integratiónslógina.

Heimildin kann, saman við tí heimild sum liggur í § 5 stk. 3 og § 7 stk. 5, tryggja, at skipanin frá lægsta stigið (trivnaðarráðgevaranum) til hægsta myndugleika, sum er avvarðandi landsstýrisfólk, kemur at hanga saman og virka til fulnar.

§ 5

Stk. 1

Greinin ásetur, at trivnaðarráðgevin skal tryggja kunning og ráðgeving, sum kunnu fremja trivnað og menning. Hetta er ein týðandi betran av fyribyrgjandi arbeiðinum.

Eitt dømi kann vera eitt barn, sum hevur heilsuligar avbjóðingar t.d. við hoyrn ella sjón; her kann trivnaðarráðgevin hjálpa foreldrunum at skapa kontakt til lækna ella heilsusystrar á staðnum, soleiðis at barnið fær neyðugar kanningar og hjálp.

Um barnið tykist at vera einsamalt, kann trivnaðarráðgevin taka samband við frítíðarvirksemi (t.d. skótar, ítrótt, samkomuarbeiðið e.a.), fyri at eftirkanna, um barnið kann luttaka her.

Tað er foreldrini sum smbr. § 2. stk. 2 kunnu taka upp samband við trivnaðarráðgevan

Stk. 2
Trivnaðarráðgevin hevur samskipandi leiklut og kann draga inn aðrar aktørar, men tekur ikki avgerðir, sum eftir lóggávu liggja hjá øðrum myndugleikum (t.d. barnavernd, Almannaverkið, heilsuverkið).
Reglan samsvarar við meginreglurnar í barnaverndarlógini § 10 um tvørfakligt samstarv.

Stk 3
Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at seta nærri reglar um uppgávur o.a. hjá trivnaðarráðgevaranum. Talan er um eina funktión, sum skal sampakka við aðrar funktiónir, sum t.d. AKT-lærara, SSP o.a., sum kunnu samskipast í ta nýggju funktiónina.

Talan verður m.a. um nærri reglar fyri hvørjar uppgávur liggja innanfyri økið hjá ráðgevaranum, hvørjar førleikar viðkomandi skal hava, hvussu møgulig samsýning e.a. skal ásetast.

Hugsast kann, at henda nýggja funktiónin fer at viðføra at aðrar funktiónir verða niðurlagaðar, og er hetta eisini í tráð við endamálið við lógini, nemliga at tryggja eina skipan sum hongur saman, og sum ikki neyðturvilliga gerst nógv dýrari.

Ásetingin gevur eisini landsstýrisfólkunum heimild til at áseta nærri reglar um, hvar henda funktion skal liggja í praksis.

Sjá nærri um hetta undir pkt. 2.1 og 2.2.

§ 6
Ásetingin tryggjar, at mál, ið eru ov torgreidd fyri ein einstakan trivnaðarráðgeva at loysa, verða lyft upp á eitt hægri stig til ein netverkssamskipara. Hetta er týdningarmikið fyri at tryggja, at faklig breidd og tvørfakligar metingar verða tiknar áðrenn málini fáa størri avleiðingar.

Hetta tvørfakliga samstarvi, samsvarar við barnaverndarlógina § 10, sum krevur tvørfakligt samstarv millum fakbólkar (læknar, sálarfrøðingar, lærarar, námsfrøðingar o.o.). Við hesi áseting verður tryggjað, at slík faklig samanseting eisini kemur at virka fyribyrgjandi sambært barnalógini, og ikki bert tá barnaverndin tekur mál upp.

Ásetingin ger greitt ábyrgdar- og arbeiðsbýti millum trivnaðarráðgeva og netverkssamskipara.

Trivnaðarráðgevin hevur ábyrgd fyri málinum á fyrsta stigið, og hevur ein samskipandi leiklut, men ber ikki ábyrgd av fakligari heildarmeting einsamallur. Tí skal hann leggja málið víðari, tá tørvur er á størri fakligum samstarvi.

Stigvísa skipanin er lýst undir pkt. 1.4 .

§ 7
Stk. 1
Greinin leggur eitt greitt mark í mun til trivnaðarráðgevan, soleiðis at trivnaðarráðgevin hevur ein fyribyrgjandi leiklut í samband við lættari og miðal torgreidd mál sambært §§ 4- 6, men at hetta mál, um tað er meir samansett og krevur serkunnleika (t.d. sosial, námsfrøðilig, sálarlig og heilsulig viðurskifti í senn) skal flytast upp til ein netverkssamskipara. Hervið verður tryggjað, at trivnaðarráðgevin ikki stendur einsamallur við málum, sum liggja uttan fyri hansara samskipandi møguleikar.
Tað, at málið verður flutt millum stigini er ikki at rokna tað sama sum, at trivnaðarráðgevin verður hektaður av málinum, men verður hesin tikin við í tann mun netverkssamskiparin metir tað vera neyðugt.
Hetta sama ger seg galdandi millum øll stigini, heilt upp til Barna- og Familjueindina sbr. § 10.

Stk. 2
Endamálið við § 7 er at tryggja, at mál, sum krevja størri fakligan breidd enn tað, trivnaðarráðgevin kann røkja einsamallur, verða samskipað gjøgnum ein netverkssamskipara. Greinin viðførir at tað kemur greitt mark millum trivnaðrráðgevan (sum tekur smærri og fyribyrgjandi mál), netverkssakiparan (sum tekur breiðari faklig mál, men ikki barnaverndarmál), og so barnaverndarlógina, sum tekur tey mál, har tørvur er á fyriskipanum sum skulu verja barnið sbr. endamálinum í § 1 í barnaverndarlógini.

Stk. 3
Netverkssamskiparin hevur ikki heimild at taka avgerðir, sum liggja hjá øðrum lógarbundnum myndugleikum, so sum heilsuverkinum (sjúkrahúslógin, psykiatrilógin), almannaverkinum (almannalógin), ella skúlaskipanini (fólkaskúlalógin). Leiklutur hansara er sambært hesari lóg at tryggja, at hesir fakbólkar verða tiknir við í arbeiðið, og at ein samlað handlingsætlan verður gjørd, sum tekur hædd fyri øllum viðurskiftum hjá barninum.

Stk. 4
Handlingsætlanin skal vera eitt tvørfakligt arbeiðsskjal, har allir viðkomandi aktørar eru partur av arbeiðinum. Ætlanin skal sampakka við aðrar skrivligar ætlanir (t.d. sernámsfrøðilig ætlan í skúlanum, stuðulsætlan hjá Almannaverkinum, viðgerðarskipan hjá heilsuverkinum e.a.) Hervið verður tryggjað at barnið og familjan hava eina samlaða og samanhangandi ætlan, heldur enn ymiskar ætlanir frá ymiskum myndugleika.

Eitt dømi uppá handlingsætlan kann vera har eitt barn fær viðgerð hjá barnapsykiatrisku eindini, samstundis sum skúlin hevur sett sernámsfrøðilig tiltøk í verk, t.d. meir stuðul í skúlagongd og hjálp til prótøkur. Ein tvørfakliga skrivlig handlingsætlan vil her tryggja at lærarar og heilsufólk samskipa hvussu barnið kann fáa skúlagongd samstundis sum barnið er í viðgerð.

Eitt annað dømi kundi verið, har eitt barn fær sernámsfrøðiligan stuðul sambært §§ 4 og 5 í fólkaskúlalógini, samstundis sum heimi hevur eina stuðulsætlan frá Almannaverkinum sambært § 3 í almannalógini. Her vil ein tvørfaklig handlingsætlan tryggja, at hesar báðar

ætlanir ikki stríðast hvør móti aðrari, men at skúlans arbeiðsætlan og stuðulin í heiminum fylgjast at.

Fylgiskjal 1 vísir hvørji punkt skulu takast við tá ein handlingsætlan verður gjørd.
Við at brúka sama leist í øllum málum kring alt landið, verður tryggja, at allar kommunur og stovnar arbeiða eftir sama leisti, og fáa øll børn / ung og familjur teirra hervið somu viðgerð, hvat handlingsætlanum viðvíkur.
Fylgiskjali er eitt dømi bert, og kann hetta verða tillaga í kunngerð sbr. § 7 stk. 5.

Stk. 5
Heimild verður givið landsstýrisfólkinum at áseta reglur um skipan, uppgávur, útbúgving, virkisøki og møguliga samsýning hjá netverkssamskipara. Hetta skal tryggja at skipanin verður eins um alt landið.

Við lógini fáa netverkssamskipararnir myndugleika at savna tær neyðugu skipanirnar, sum skulu til, fyri at gera eina virkisætlan fyri tað einstaka barnið, sum hevur tørv á eini samskipaðari loysn.

Møguligar útbúgvingar sum samskiparin eigur at hava kann vera sosialráðgevi, sernámfrøðiligur rágevi, sálafrøðingur ella annað.

Av tí at talan er um eina nýggja funktión, verður heimild eisini givin til at ásetta í kunngerð hvar henda funktión skal liggja í praksis, eins og við trivnaðarrágevaranum § 5 stk. 3.

§ 8
Ásetingin viðførir , at netverkssamskiparin kann leggja eitt mál fram fyri Barna- og familjueindina, um netverkssamskiparin metir tað vera neyðugt. Endamálið við hesari áseting er at tryggja, at tey mál, har tørvur er á stuðli ella samskipandi sparring, kunnu verða lyft til eitt hægri stig.

Ásetingin gevur netverkssamskiparanum møguleika, men ikki skyldu, at leggja málið fyri Barna- og Familjueindina Tað er ein fortreyt, at meting verður gjørd av netverkssamskiparanum um hetta, og ásetingin gevur ikki í sær ein rættarkrav hjá borgarum upp á, at málið verður lagt fyri Barna- og familjueindina.

§ 9
Við hesi áseting verður ein Barna- og familjueind sett á stovn. Endamálið við Barna- og familjueindini er at styrkja samanhang og samstarv í tænastum til børn og familjur, serliga í teimum førum, har avbjóðingarnar eru samansettar og fevna um fleiri geirar. Eindin skal virka sum ein samlandi og samskipandi funktión á skipanarligum stigi, og skal stuðla undir, at børn og familjur møta einum meira samanhangandi og fyriskipanarliga greiðum hjálpartilboði. Eindin skal menna og stuðla arbeiðinum hjá netverkssamskiparum, trivnaðarráðgevum og øðrum viðkomandi funktiónum.

Eindin hevur ikki til uppgávu at taka yvir einstøk barnamál, at virka sum málsviðgerandi myndugleiki ella at taka avgerðir fyri aðrar stovnar ella myndugleikar. Ábyrgdin í einstøkum málum liggur framvegis hjá teimum myndugleikum og fakfólkum, sum hava lógarbundnu

ábyrgdina, og í samansettum málum er tað netverkssamskiparin, sum framvegis hevur ta samskipanarligu ábyrgdina sambært hesi lógini.

Barna- og familjueindin skal í staðin:

- styrkja arbeiðshættir, samráð og samanhang millum geirar,
- stuðla netverkssamskiparum og trivnaðarráðgevum við vitan, amboðum og fakligari sparring,
- og savna og miðla læring og royndir á tvørs av kommunum og geirum.
- at virka fyri skipanarligum broytingum, sum kunnu gera tað einfaldari at veita samanhangandi tænastur til børn og familjur

Eitt týðandi endamál er eisini at stuðla undir, at upplýsingar – innan fyri galdandi reglur um dátuvernd og samtykki – kunnu fylgja barninum, so hjálp og átøk verða betri samskipað og endurtøkur og misskiljingar lækka.

§ 10

Við hesi áseting verður ásett, at Barna- og familjueindin kann taka einstøk mál upp í sambandi við viðgerðina um samskipan, um mett verður, at netverkssamskiparin ikki hevur troytt allar viðkomandi møguleikar. Ásetingin hevur til endamáls at gera tað møguligt at seta inn við víðari samskipan og fakligum stuðli í teimum málum, har tørvur er á hesum. Barna- og Familjueindin kann antin veita ráðgeving og sparring um, hvussu netverksamskiparanum kann arbeiða víðari við málinum, ella troyta møguleikan í stk. 2.

Stk. 2

Her verður ásett, at Barna- og familjueindin í teim førum mál verða lagt fyri tey, eisini fær heimild til sjálv at innkalla allar viðkomandi partar til samráð sum liður í at stuðla netverkssamskiparanum í arbeiðinum við at fremja samskipan av tænastum til barnið.

Samstundis verður greitt ásett, at netverkssamskiparin varðveitir ábyrgdina fyri málinum. Hetta er gjørt fyri at tryggja greidleika í ábyrgdarbýtinum og fyri at forða fyri, at eindin yvirtekur málsábyrgdina.

Stk. 3

Um eitt mál ikki verður loyst sambært stk. 1 ella stk. 2, kann Barna- og familjueindin, eftir einari fakligari meting, velja at leggja málið fyri avvarðandi myndugleika sum varða av økinum.

Avvarðandi myndugleiki her er at rokna bæði landspolitisk og kommunalt, tvs. málið kann leggjast fyri hægri landsstýrisfólki innan viðkomandi økið ella / og viðkomandi kommuna. Hetta kann verða tilfeldi antin tá t.d. ein stovnur ikki vil viðvirka til at loysa eitt mál hóast neyðug heimild og tilfeingi er til staðar innan málsøkið hjá viðkomandi, ella um eindin kann staðfesta at neyðug tilboð av eini ella aðrari orsøk ikki eru tøk í Føroyum

Ásetingin gevur sostatt ikki Barna- og familjueindini heimild at taka avgerðir innan málsøki, sum hoyra undir landsstýrisfólk, men tryggjar ein skipaðan framferðarhátt, tá mál ikki kunnu loysast innan verandi skipan, av eini ella aðrari orsøk.

Stk. 4

Ásetingin gevur heimild til at seta nærri reglur um skipan av eindini, soleiðis at endamálið og skipanin av hesari smbr. pkt. 2.2. verður nátt.

§ 11
Barna- og familjueindin skal savna inn viðkomandi hagtøl og gera árliga frágreiðing um arbeiði innan eindina. Endamálið við hesum er at styrkja kunnleikan um heildarmyndina av støðuni hjá børnum og ungum í Føroyum, og at tryggja eitt betri grundarlag fyri menning, eftirmeting og politiska raðfesting á barna- og ungdómsøkinum. Ásetingin snýr seg um innsavnan og nýtslu av hagtølum og almennari vitan, og fevnir ikki um viðgerð av persónsupplýsingum um einstøk børn ella familjur.

Í hesum sambandi er tað týðandi at vísa á, at Hagstovan longu hevur fingið játtan at fara undir at innsavna og menna hagtøl um barnamenning og viðurskifti hjá børnum og ungum. Hesi hagtøl kunnu fevna um viðurskifti, ið hava týdning fyri trivnað, menning, útbúgving og sosial støði, og kunnu geva eitt fakligt og samanhangandi yvirlit yvir støðuna og menningina á økinum yvir tíð. Hagtøl frá Hagstovuni skulu, saman við øðrum almennum hagtølum og dátum, kunna innganga sum eitt týðandi grundarlag undir árligu frágreiðingini. Endamálið við frágreiðingini er at savna og miðla vitan um heildarstøðuna hjá børnum og ungum, at varpa ljós á høvuðstendensir og avbjóðingar, og at skapa eitt felags og gjøgnumskygt grundarlag fyri politiska viðgerð og alment kjak.

Umframt hagtøl er tað eisini mett týðandi at taka støði í vitan og greiningum frá gransking og menning. Í hesum sambandi kann vitan frá granskingareindini fyri børn og ung á Setrinum, umframt aðrari viðkomandi gransking, verða nýtt sum liður í arbeiðinum við árligu frágreiðingini. Hetta kann geva eina djúpari fakliga fatan av teimum hagtalsligu úrslitunum og varpa ljós á samanhangir og orsakir, sum ikki altíð síggjast í tølum einsamøllum.

Árliga frágreiðingin er ætlað sum eitt strategiskt og kunningargrundandi amboð, og ikki sum eftirlit við einstøkum myndugleikum ella tænastum. Frágreiðingin skal stuðla undir læring, menning og betri samskipan tvørtur um geirar, og kann eisini nýtast sum grundarlag fyri møgulig tilmæli um broytingar í arbeiðsháttum, skipanum ella lóggávu.

Innsavnan og nýtsla av hagtølum og vitan skal altíð fara fram í samsvari við galdandi reglur um dátuvernd og góðan hagtalssið. Endamálið er at styrkja vitanina um støðuna hjá børnum og ungum sum heild, og harvið skapa betri treytir fyri at menna ein samanhangandi og vitanargrundaðan barna- og ungdómspolitikk í Føroyum.

§ 12
Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu ábyrgd av barna- og familjueindini.

Ásetingin skal tryggja, at Barna- og familjueindin fær eina greiða fyrisitingarliga ábyrgd, soleiðis at eindin virkar innan fyri tær karmar sum landsstyrisfólkið setur.

Stk 2
Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um virkisøki og skipan av Barna- og familjueindini, harundir m.a. hvussu Barna- og familjueindin skal virka fyri og stuðla uppundir at fáa skipanina sbr. hesari lóggávu at virka í praksis.

Ásetingin skal tryggjað, at skipanin kann tillagast tá mett verður neyðugt, at skal virka fyri, at Barna- og familjueindin sampakkar við onnur øki.

Starvsfólkini í Barna- og familjueindini mugu hava fakligu førleikarnar, sum eru neyðugar fyri at røkja eina samskipandi og stuðlandi uppgávu á skipanarligum og organisatoriskum stigi. Eindin er ikki saksviðgerandi, og fakligu krøvini eru tí serliga knýtt at innliti í almennar skipanir, organisatoriska menning og tvørgeiraligt samstarv.

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkini hava innlit í skipanarlig viðurskifti og royndir við, hvussu ábyrgd, heimildir og arbeiðshættir eru skipaðir tvørtur um ymiskar geirar. Umframt hetta skulu starvsfólkini hava góðar førleikar í samskifti, samstarvi og fasilitering, soleiðis at tey kunnu stuðla upp undir felags fatan, samráð og menning millum myndugleikar og stovnar.

Starvsfólkini skulu harumframt hava breitt fakligt innlit í barna- og ungdómsøkið, herundir vitan um trivnað, fyribyrging og samansettar tørvir hjá børnum og familjum, og evni at savna, greina og miðla vitan á ein hátt, sum er gagnligur fyri praksis og politiska viðgerð.

Sum dømi um viðkomandi útbúgvingar og fakligar bakgrundir kunnu nevnast:

- samfelagsvísindalig ella samfelagslig útbúgving, eitt nú innan samfelagsfrøði, sosiologi ella almenn fyrisiting,
- útbúgving innan pedagogikk, sosialt arbeiði ella psykologi,
- útbúgving innan leiðslu, skipanarliga ella organisatoriska menning,
- ella aðrar viðkomandi útbúgvingar, sum geva førleikar at arbeiða tvørgeiraligt og menningarliga.

§ 13
Ásetingin tryggjar at allir neyðugir upplýsingar um støðuna hjá barninum / tí unga fylgja málinum, bæði innan skipanina eftir hesari lóg og til aðrar myndugleikar. Hetta er eisini í samsvar við t.d. barnaverndarlógina, sum gevur heimild til, at upplýsingar um viðurskifti hjá barninum / tí unga kunnu latast millum barnavernd, heilsu- og skúlaverk, tá tað er neyðugt fyri at tryggja barnsins besta.

Barnið og foreldur, og onnur í foreldranna stað,hava rætt til innlit í, hvørjar hvørjir myndugleikar hava móttikið upplýsingarnar, uttan so at serlig atlit til barnið tala ímóti, t.d. um fráboðan inniheldur upplýsingar um onnur børn, sum ikki skulu vera almannakunngjørd fyri foreldrum hjá einum øðrum barnið (t.d. har talan er um, at eitt barn sigur frá ágangi ella happing, og navnið hjá øðrum barnið er nevnt; her kann tað vera neyðugt at verja tað barnið, og ikki útflýggja navni á hesum)

Ásetingin staðfestir, at ábyrgdin at tryggja flutning av upplýsingum liggur bæði hjá einstøkum fakfólkum og stovnum.

Latan av upplýsingum skal altíð fara fram sambært reglunum um persónsvernd. Upplýsingar sum fylgja barninum, skulu einans latast víðari eftir prinsippinum um minst neyðugu upplýsing

§ 14
Áseting um gildiskomu.

Lógin verður sett í gildi stigvíst, soleiðis at §§ 9 og 12 koma í gildi tann 1. Januar 2027 og restin verður sett í gildi tann 1. Januar 2028.

Endamálið við hesi stigvísu gildiskomuni er at tryggja eina skipaða, haldføra og samanhangandi verkseting av nýggju skipanini.

Við at lata ásetingarnar um Barna- og familjueindina (§ 9) og yvirskipaða fyrisitingarliga ábyrgdina (§ 12) koma í gildi eitt ár áðrenn hinar ásetingarnar, verður lagt upp til, at grundarlagið undir skipanini verður bygt upp fyrst. Í hesum innleiðandi stiginum fær Barna- og familjueindin tíð og rúm til at verða skipað, mannað og forankrað í tættum samstarvi við kommunur og viðkomandi geirar. Eindin kann í hesum tíðarskeiði arbeiða við at menna felags fatan, arbeiðshættir og mannagongdir, og at leggja eitt organisatoriskt og fakligt grundarlag fyri seinni verkseting av teimum stigvísu hjálparskipanunum við trivnaðarráðgevum og netverkssamskiparum.

Restin av lógini, herundir ásetingarnar um trivnaðarráðgevar, netverkssamskiparar og stigvísa hjálparskipan annars, kemur í gildi tann 1. januar 2028. Hetta gevur eitt ár til felags fyrireiking, førleikamenning og organisatoriska tillaging í kommunum og stovnum, soleiðis at skipanin kann verða sett í verk á ein tryggan og samanhangandi hátt.

Mælt verður til, at landsstýrisfólkið í 2030 setur fram løgtingslógaruppskot um at endurskoða løgtingslógina, hetta tí talan er um nýbrot innan føroyska lóggávu og harnæst talan um nýggja samskipandi skipan, ið má eftirmetast, tá tíð er fráliðin.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Handlingsætlan
Fylgiskjal 2: Umbøn og samtykki til samskipan
Fylgiskjal 3: Barnafrágreiðing 2025
Fylgiskjal 4: Barnahoyring 2025

Fylgisskjal 1:

Dømi. Handlingsætlan fyri barn / ung

Barn:
Navn: _____
Aldur: _____
Bústaður: _____

Familja/verjar:
Nøvn: _____

Netverkssamskipari: _____
Kommunan: _____

Tíðarramma fyri handlingsætlanina:
Frá: ___ / ___ / ___ Til: ___ / ___ / ___
Metingar: (t.d. eftir 3 mánaðir / 6 mánaðir)

---

1. Støðumeting

(Stutt lýsing av støðuni: skúli, heilsuverkið, familja, frítíð, sosial støða o.a.)

---

2. Yvirskipað mál

(Hvat skal barnið / tann ungi røkka við hesi ætlanini? T.d. trivnaður, menning, støðug skúlagongd, betri heilsustøða)

---

3. Tiltøk og ábyrgd

Øki (skúli, heilsa, familja, frítíð)	Tiltøk	Ábyrgd	Møgulig tíðaráseting
Skúli			
Heilsa			
Familja			
Frítíð			
Samskipan	Regluligir fundir við allar aktørar	Netverkssamskipari	

---

4. Uppfylging

- Nær og hvussu verður ætlanin endurskoðað?

Hvør stendur fyri at savna allar partar til meting? Netverkssamskipari e.a.

---

5. Hoyring og samtykki

- Barnið / tann ungi er hoyrdur: ☐ Ja ☐ Nei
- Foreldrini/verjar hava samtykt tiltøkini: ☐ Ja ☐ Nei

---

6. Undirskriftir

Netverkssamskipari: _____

Foreldur/verjar: _____

Viðkomandi fakfólk (skúli, heilsumyndigleikar, almannaverki, o.o.):
_____

Fylgiskjal 2: <u>Umbøn um samskipan av tænastum og samtykki til viðgerð av persónsupplýsingum</u>

Undirritaði/u, sum varða av barninum – sum foreldur ella onnur í foreldranna stað – biðja hervið um samskipan av teimum tænastum og átøkum, ið eru viðkomandi fyri barnið:

Navn á barni: [navn]
P-tal/føðingardagur: [p-tal ella føðingardagur]

Í hesum sambandi geva vit hervið samtykki til, at neyðugar og viðkomandi upplýsingar um barnið og familjuna kunnu verða savnaðar, móttiknar og deildar millum viðkomandi stovnar, fakfólk og myndugleikar, í tann mun hetta er neyðugt fyri at skipa og samskipa tænasturnar.

Samtykkið fevnir einans um upplýsingar, ið eru viðkomandi fyri endamálið, og viðgerð av persónsupplýsingum skal fara fram í samsvari við galdandi lóg og reglur um vernd av persónsupplýsingum (persónsdátuvernd).

Vit eru kunnað um, at samtykki kann verða tikið aftur til eina og hvørja tíð.

Dagfesting: _____

Undirskrift(ir): _____

Navn/nøvn (við blokkbókstavum): _____